Løgni Bob í Horsens

©Ian V. Ka

The Neverending Tour, er heiti› á óendaligu konsertfer›ini hjá Bob Dylan, sum nú í fleiri ár hevur ført hann kring allan knøttin. Sunnukvøldi› var Bob Dylan á vitjan í Horsens í Danmark, har hann í einum lítlum sali, har bara 450 fólk kundu rúmast, helt konsert í tveir tímar. Ta› eru annars ikki nógvar heimsstjørnur sum høvdu tíma› at fer›ast úr Amerika heilt til Danmarkar, at hildi› eina konsert fyri 450 áhoyrarum. Bob Dylan er nú ikki heilt sum øll onnur, og hann hevur einki ímóti at ganga n‡ggjar lei›ir.

Nógv var gjørt burtur úr hesari konsertini, sum var tann einasta á danskari jør› á hesum sinni. Gravgangurin eftir at ogna sær eitt av teimum 450 atgongumerkjunum var øgiligur. Tá fari› var undir at selja atgongumerkini, fyri nøkrum mána›um sí›ani, var ta› ein ungur ma›ur sum svav í fimm døgn uttan fyri bilettkontóri›, fyri at vera vísur í at sleppa inn sunnukvøldi›.

Danskir fjølmi›lar vóru eisini rættuliga væl nøgdir vi› konsertina sunnukvøldi›. Bæ›i Ektrabla›i› og B.T høvdu fólk á sta›num. Ekstrabla›i› gevur seks út av seks møguligum stjørnum vi› or›unum, "mest t‡›andi núlivandi persónur í tónleikasøguni". Ummælarin hjá B.T. er ikki so sannførdur, men gevur fimm av seks møguligum stjørnum.

Bob Dylan byrja›i konsertina vi› Roving Gambler, á›renn hann fór í holt vi› eina nærum ókenniliga útgávu av My Back Pages. Teir næstu tveir tímarnar koyrdi ta› bara, og sum ummælarin hjá B.T. skrivar, so tók Bob Dylan tíbetur bara einafer› munnharpuna fram. Vælnøgdi ummælarin hjá Ekstrabla›num endar sítt ummæli vi› at konkludera, at av fimtu rekkju til vinstru, líktist konsertin einari av mest t‡dningarmiklu tónlistarligu hendingunum á danskari jør› nakrantí›.

Gyltu pálmarnir til Lars von Trier

Danski filmsleikstjórin Lars von Trier, fekk sunnukvøldi› endiliga tann hei›ur, hann tey seinastu 15 árini hevur bí›a› eftir, nevniliga tá n‡ggi filmurin hjá honum, Dancer In The Dark, fekk teir gyltu pálmarnar á filmstevnuni Cannes í Fraklandi. Tann ofta mistulka›i danski leikstjórin var sjálvur hjástaddur í Cannes, sjálvt um hann ræ›ist bæ›i at flúgva, sigla og at koyra.

Lagi› var óføra gott á Lars von Trier, tá hann møtti fjølmi›lunum aftana handanina av teimum gyltu pálmunum. – Nú manglar mær bara at vinna teir einafer› afturat, solei›is at eg kann koma ájavnt vi› landsmannin hjá mær Bille August, su hevur vunni› pálmarnar tvær fer›ir. Lars von Trier vænta›i ikki at ta› nú fór at ganga so long tí› til hann aftur fór at fáa teir gyltu pálmarnar. – Eg eri vi› árunum vorin alt meiri komerciellur, so eg trúgvi at eg ikki noy›ist at bí›a í 15 ár, til ta› fer at henda aftur.

Filmurin hjá honum, Dancer In The Dark, vi› íslendsku Bjørk í høvu›sleiklutinum fekk rættuliga blanda›a móttøku í Cannes. Danskir og evropeiskir fjølmi›lar kappa›ust um av rósa n‡ggja avrikinum hjá Lars Von Trier, men amerikumenn vóru langt meiri ivandi. Amerikanska filmsbla›i› Variety fór enntá so langt, sum at kalla filmin, sum er skipa›ur sum ein musical, fyri eitt sætt makkverk, har sjónleikararnir og koreografiin rættuliga fingu av at vita.

Blanda›a móttøkan for›a›i tó ikki fyri at filmurin fekk teir gyltu pálmarnar, sum er tann mest vir›ismetta vir›islønin ein filmur kann fáa í Evropa. Lars von Trier hevur fleiri fer›ir fyrr veri› um reppi› at fingi› vir›islønina. Seinast vi› filminum Breaking The Waves. Umframt at Dancer In The Dark fekk gyltu pálmarnar, so fekk eisini Bjørk, sum hevur høvu›sleiklutin í filminum, vir›isløn fyri at vera besti kvinnuligi sjónleikari.

Tí›indi hava í seinastuni gingi› um at vátt kom í rei›ri› millum Lars von Trier og Bjørk undir upptøkunum, og at hesi bæ›i ikki tosa›u saman. Lars von Trier royndi eftir at gyltu pálmarnir vóru komnir í hús at slætta sjógvin, tá hann í samrø›u vi› fjølmi›larnar n‡tti høvi at takka Bjørk fyri eitt gott avrik, tá hann seg›i – Sig vi› Bjørk, at sjálvt um hon ikki tr‡r mær, so elski eg hana.

UK TOP 20 CHARTS

Album

1 The Greatest Hits - Whitney Houston
2 Oops! I Did It Again - Britney Spears
3 Reload - Tom Jones
4 Play - Moby
5 Binaural - Pearl Jam
6 Greatest Hits/Shining Like A... - Paul Simon
7 Science & Nature - Bluetones
8 Supernatural - Santana
9 2001 - Dr Dre
10 At His Very Best - Engelbert Humperdinck
11 M??ing - Super Furry Animals
12 The Heat - Toni Braxton
13 Come On Over - Shania Twain
14 The Man Who - Travis
15 Westlife - Westlife
16 Rise - Gabrielle
17 Things To Make And Do - Moloko
18 The Woman In Me - Shania Twain
19 Brand New Day - Sting
20 Unleash The Dragon - Sisqq

BBC

3arin

Mest seldu fløgur

1. Ymiskt - Absolute Music 23
2. Britney Spears - Oops! I did i again
3. Whitney Houston - Greatest Hits
4. Vengaboys - The Platinum Album
5. Ymiskt - Now 45
6. Westlife - Westlife
7. Melanie C - Northern Star
8. Hanson - This Time Around
9. Bon Jovi - It's My Life
10. Bomfunk MC's - In Stereo
11. Jessica Simpson - Sweet Kisses
12. Toni Braxton - The Heat
13. Bellamy Broth. - Best Of The Best
14. Pearl Jam - Binaural
15. Soundtrack - South Park
16. Ymiskt - Real Country
17. Red Hot Ch. Pep. - Californication
18. Cypress Hill - Skull And Bones
19. Danser M. Drenge - Popsamling
20. Blink 182 - Enema Of The State

Kelda: 3´arin

Føroyski Pop Top listin

Rás 2 - FM 102 & FM 107

EYKALØG

Malin Zachariassen	Æra til Guds lamb
Dagfinn & Impulz	Yahi
Ma›ur:Glotti	Svim
Jóannes Jacobsen	Sangur um ein klút
Ti›na›	Torir Jesusi tú fylgja

POP TOP LISTIN

1.	Ragnar í vík	There's a tear in my beer
2.	Malan Thomsen	Stjørnurnar blinka
3.	Kristina Heldarsskar›	Til mánan
4.	Taxi	Ísakøld
5.	Heini Lützen	Vit vóru orsøk
6.	Pætur vi› Keldu	Love
7.	Sølva & Bergmenn	Tí›arfló›
8.	Kular Røtur	Vinur mín Nósi
9.	Frændur	Brot og vandasker
10.	Wild Child	Remember me
11.	Rakul Bærendsen	Mynnismyndin Kær
12.	Moira	Omaneftir ni›aneftir
13.	Beinta Zachariassen	Lítla barn
14.	Magni Christiansen	Ein dag eg skal
15.	Stanley Samuelsen	Um eg kundi kvø›i›
16.	Plastnoist	Trolarablues
17.	Present Past	Mr. Sleazy
18.	Fuglafjar›ar Gentukór	Mánadags Mortan
19.	Ívar Bærentsen	Náttin er von
20.	Jørgin Dahl	Moments

Atkvø›ast kann umvegis heimasí›una www.pegasus.fo/poptop ella á fax 456501.

Til ber eisini at senda atkvø›use›ilin til Pop Top Listin, box 322, 700 Klaksvík.

Evsta mark fyri atvkvø›ugrei›slu er fríggjakvøld kl. 18.00.

Svara so!?

20 spurningar til R na J kupsson

Navn?
Rúni Jákupsson
Nær ert tú føddur?
01.05.74
Besti Matur? Funky gr‡tan hjá Suna Poulsen
Besti drykkur?
Tullamore dew
Hvørjum tónleiki lurtar tú eftir?
Gó›um tónleiki í øllum genrum
Hvat er besti bólkur ella sangari?
Sting
Hvat er tín besta fløga?
Operation Mindcrime - Queensryche
Hvat er tín størsti veikleiki?
Orki illa upp um morgunin
Besti persónligi eginleiki?
Høgra beini›
Hevur tú naka› frítí›aríttriv?
Tónleikur, ganga í náttúruni, rógvi á internetinum o.m.a.
Hvat er best á Rás 2?
Ítróttarsendingin hjá Ey›un Klakstein og Honnu Vágsheyg í har›ari kapping vi› Pop Top Listan hjá Fró›a Løkságar› og Gunnar Nolsøe
Hvør er tín fyrimynd?
Eg havi fleiri
Størsta uppliving?
Vónleyst at draga eina ávísa burtur úr
Hvat er títt største ynski?
At duga betri at liva í nú´inum
Spælir tú naka› ljó›føri?
Syngi undir brúsuni av og á
Besta bók tú hevur lisi›?
1984 - George Orwell
Hvørjar 3 lutir hev›i tú tiki› vi› á eina oydna oyggj?
Árabát, kumpass og atlas
Hevur tú eitt motto?
Generaliseringar eru generelt skeivar